## DAGSINS MEINING

# Dystur óavgjørdur

Nú um dagarnar var forsetaval í Finlandi og sosialdemokraturin Tarja Halonen, sum stóð til at vinna fyrsta umfar, vann fyrsta valumfar. Men Tarja Halonen, sum fekk góð 46% av atkvøðunum, verður uttan nakran iva vald í øðrum umfari um fjúrtan dagar. Her eru allir eygleiðarar samdir. Halonen er fyrsta kvinna, sum gjørdist forseti Finlands. Hon er eisini fyrsti forseti valdur sambært nýggju grundlógina, sum kom í gildi fyri seks árum síðani. Undir gomul grundlógini hevði forsetin sera nógv vald. Vald hansara kundi samanberast við valdið hjá t.d. franska forsetanum. Henda skipan var nakað broytt við nýggju grundlógini, men tó ikki meira enn so, at forsetin framvegis hevur nógv at siga serstakliga í uttanríkis- og trygdarpolitikkinum.

Tarja Halonen hevur tikið henda partin av embæti sínum í størsta álvara. Hetta hevur serstakliga verið galdandi fyri ES politikkin, har hon støðugt hevur møtt til forsætisráðharrafundirnar saman við Matti Vanhanen, forsætisráðhara. Halonen hevur staðiliga hildið fast við ta áskoðan, at nú ES samstarvið er farið at fevna um trygdarpolitiskar spurningar, so hevur forsetin høvuðsábyrgdina av ES politikkinum. Hetta dámar, sum vera mann, forsætisráðharranum illa, og betur verður tað ikki av, Vanhanen eisini sjálvur er valevni til forsetaembætið. Vanhanen heldur ikki, at forsetin eigur at leggja seg út í uttanríkispolitikkin, men eigur forsetin heldur at vera ríkisovasti og bert at umboða tjóðina. Her stendur sostatt eftir hjá finsku politisku skipanini at finna eina hóskandi javnvág.

Tarja Halonen er sera vældámd í finska fólkinum. Ein orsøkin er, at hon í atburði og forsetaligari medferð er sera fólkslig og ikki hevur firnast fyri at ganga í móti tí politiska meginstreyminum í málum av etiskum og principiellum slagi. Hetta dámar fólki væl. Hon heldur rimmarfast við, at tað t.d. er hon sum forseti, ið ger av, um finskir hermenn skulu sendast til Afghanistan. Við hesari støðutakan er hon á somu politisku kós, sum Kekkonen og Koivisto, sum høvdu ta støðu, at uttanríkis- og trygdarpolitikkurin hoyrir forsetanum og ikki ríkisdegi og stjórn til. Komandi finski forestin, sum uttan iva verður Halonen, má tó nú saman við stjórnini finna eina hóskandi javnvág, soleiðis, at forsetaembætið kann finna sín endaliga form. Eygleiðarar meta, at henda tilgongd fer at enda við at myndugleikin hjá finska forestaembætinum fer at liggja nakað miðskeiðis millum tilsvarandi myndugleika hjá ávikavist amerikanska og franska forestaembætinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Er løgmaður desperatur?



**HEIDI PETERSEN**
Løgtingskvinna

Løgmaður velur heldur álop á politiskan flokk og andstøðukvinnu, heldur enn at svara upp á spurningarnar, eg setti honum, sigur Heidi Petersen, løgtingskvinna í aftursvari til Jóannes Eidesgaard

Løgmanni so líkt, ístaðin fyri at svara upp á spurningarnar, eg bar fram í grein míni í bløðunum, settir einum løgmanni, sum vælsaktans er løgmaður fyri alt Føroya fólk, eisini fyri meg sum tjóðveldisfólk, so loypur hann beint á Tjóðveldisflokkin og tey sjónarmið, eg beri fram í greinini.

Vit fáa onki svar og onga sakliga grundgeving, heldur onga politiska grundgeving fyri tí, sum løgmaður hevur latið farið fram. Hálar vánaligar umberingar úr lummanum, sum ganga út upp á, hvat undanfarna samgonga gjørdi. Á hvønn hátt legitimera undanfarnar samgongur tað, løgmaður ger í dag? Hvussu leingi ætlar Føroya løgmaður at liva av politiskum umberingum, ístaðin fyri at taka ábyrgd av tí, ið fer fram meðan hann enn situr sum løgmaður?

Hevði vónað at fingið eitt greitt svar upp á spurningarnar, eg setti løgmanni, men hann nýtir enn einaferð álop sum vápn í politiska orðaskiftinum, og tískil er lítil vón fyri, at vit fáa nyttu av teimum demokratisku amboðum, vit nú einaferð hava í Føroyum. Demokratiski rætturin til alment orðaskifti, kjak og viðmerkingar, sum er ein av grundarsteinunum í einum sunnum fólkaræði. Heldur velur Føroya løgmaður álop á politiskan flokk og andstøðukvinnu. Stórt spell og lítil styrki, ella kanska er hann desperatur yvir støðuna, hann hevur komið okkum í?

Eftir standa ein røð av ósvaraðum spurningum.

# Stuðul frá tær sjálvum at keypa tað, tú eigur frammanundan?



**BILL JUSTINUSSEN**
F. Miðflokkin



**JENIS AV RANA**
F. Miðflokkin

Tað ljóðar sum tað bera skemt, men er tó seinasta uppskot Fólkafloksins um umfordeiling av ágóðum samfelagsins, sigur Miðflokkurin í yvirlýsing

Støðan í dag er hon, at hvør einasti føringur eigur lut í ávísum vinnufyritøkum. Og talan er ikki um hissini fyritøkur. Nakrar av kendastu eru Atlantsflog, Føroya Banki, Føroya Fiskavirking og Føroya Tele. Semja er um, at flestu teirra eru væl riknar, vitan og tænastur eru bygdar upp, og eru ein ogn í sær sjálvum. Og fitt yvirskot kemur hvørt ár í landskassanhvørjum einasta føringi (tvs. ognarunum) til fyrimunar.

Uppskot Fólkafloksins, serverað av Útvarpi Føroya sunnudagin kl 14.00, er at nú skal tann føroyingur, ið kann og vil, kunna fáa stuðul úr landskassanum (tvs. úr sínum egna lumma) til at keypa partabrøv í nú almennu fyritøkunum (tvs. frá sær sjálvum), tá hesar verða privatiseraðar (tvs. tiknar frá hesum sama føroyingi).

Fantastiskt- genialt!

Tað mest geniala er tó, at flestu føringar, t.d. illa sperdar barnafamiljur, pensionistar, arbeiðsleys og vit kundu hildið á, tey hava neyvan ráð at keypa, fáa tí ongan studning og missa ta ogn, tey í dag eiga. Hini, tey, ið hava peningin kláran, kunnu í friði og náðum leggja inn undir seg aftur tær ognir, sum vanligi føringurin bjargaði í kreppuni –og fáa harafturat beinleiðis atgongd í landskassan eftir peningi at gjalda part av hesum keypi við.

Og stuðul man hann, Fólkaflokkurin, fara at fáa – lítil ivi um tað. Fyrstur at koma við tankanum var verandi løgmaður, sum longu í 2000 skeyt upp at geva part av Føroya Banka (sum vanligi føroyingurin átti og eigur) til sama vanliga føroyingin, og hugsjónaliga man Sambandsflokkurin liggja á somu linju.

Einasti áhugaverdi spurningur er, um Tjóðveldisflokkurin vaknar og gjøgnumskoðar einskiljingarsjónleikin.

Stuðul frá tær sjálvum at keypa tað, tú eigur frammanundan?

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað áðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**

Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.